**Fiskirannsóknarstovan**

# Snellusurvey

**Royndir gjørdar við M/S Hoyvíkingi**

**FRS smárit 99/02**

# “Snellusurvey”

Royndir gjørdar við M/S Hoyvíkingi.

Tíðarskeið: 16. sept. til 4. okt. 1998.

**Ábyrgd:** Kristian Zachariassen

**Við fyri FRS:** Kristian Zachariassen

**Skrivað frágreiðing:** Kristian Zachariassen


**Samandráttur:** Tað hevur oftað verið tosað millum fiskimenn, serliga tá lítið var til av toski inni á landgrunninum, um nakar fiskur var at fáa norðanfyri. Vanligt var at skipini, sum royndu við sildagørnum í fimmti og sekstiárunum, fingu tosk, upsa og kongafisk í sildagørnunum og á snøri, sum teir høvdu hangandi úti um náttina.
Í fíggjarlógini fyri 1998 var peningur játtaður til at gera eina roynd við snellu á djúpum vatni í føroyskum øki.
Hoyvíkingur varð leigaður at gera royndirnar, sum vardu 19 dagar. Leitað og fiskað varð yvir eitt stórt øki. Sigldir vórðu gott 2000 fjórðingar, men veiðan var sera lítil, bert 500 kg av fiski.


**Endamál:** Endamálið við royndunum var at kanna um nakar fiskur var at fáa við snellu uttan fyri føroyska landgrunnin og bankunum vestanfyri. Tá roynt var við sildagørnum norðanfyri, var tað ofta toskur at fáa við snøri, eins og upsi og kongafiskur. Hvussu nógv er ringt at siga, tí mest var tað kokkurin, sum fiskaði til døgurða. Hetta fyribrigdið hevur ofta verið frammi, serliga tá lítið av toski var at fáa undir Føroyum og borið hevur verið framm at nógv meira av fiski stóð uppi í sjónum uttan fyri landgrunnin, enn hildið hevur verið.

**Útgerð og framferðarháttur:** M/S Hoyvíkingur var leigaður at gera royndirnar. Hoyvíkingur er 183,47 brt til støddar og hevur ein 500 hk Caterpillar motor. Hann er útgjørdur at fiska við snellu, og hevur burturav fiskað við snellu tey seinastu árini undir Føroyum og í Íslandi. Hann hevur 15 automatiskar “Vágasnellur” og hesar vórðu nýttar til endamálið.

Útgerðin í nýtt varð vóru vanligar fultautomatiskar Vágasnellur við vanligum “Bull” beitihúkum nr. 11 og 7 punds loddum. Á snellunum vóru millum 350 m og 420 m av nylon. Tó høvdu vit á trimum snellum ( á byrja við einari) gott 1200 m av 1,1 mm “Dynex” bøtingartráði.
At leita við hevði Hoyvíkingu 2 ekkolodd. Eitt, sum sendur lágfrekvens og eitt sum sendur høgan frekvens.
Umframt snellurnar høvdu vit tvær dyrgiskipanir til makrel. Hetta eru langdergur, sum hava 45 húkar hvør. Hesar dergur verða førdar gjøgnum eina rullu við avkrøkjara og verða síðan førdar frameftir um eina rullu og aftur í eina fultautomatiska snellu.

Áðrenn túrurin byrjaði, høvdu vit lagt eina siglingarleið, men hon varð ikki nýtt orsakað av veðrinum, tí um skipið rullar ov illa, kemur tað nógv óljóð á ekkoloddskermin. Vit settu okkum tó fyri at royna so víða í økinum, sum gjørligt. Tó løgdu vit serligan dent á økið har garnaskipini mest vóru í september mánað. Í frágreiðingini "Faroese fishery for Atlanto Scandian Herring 1950-1969" eru vístar leiðirnar hjá garnaskipunum millum 1956 og 1968.
Leitingarferðin var millum 4 og 8 míl. Tað lágfrekventa ekkoloddið vísti fyri tað mesta niður á 320 fv., meðan tað háfrekventa vísti niður á 200 fv. Um tað var grynri enn uml. 400 fv., vísti tó annað ekkoloddið niður á botn.
Tá nakað var at síggja, varð kastað við snellu ella dyrgt við makreldorg. Um einki var at síggja, varð tó kastað 2.-3. hvønn tíma. Um náttina varð bert fiskað viðhvørt.
Tá vit dyrgdu, nýttu vit 2 dergur, eina í hvørjum borði. Oftast vórðu tá eisini ein ella tvær snellur koyrdar út fyri at vita, um fiskur var longri niðri.
Tá fiskað varð við snellu, vórðu vanliga 7 snellur nýttar. Allur tráðurin á snellunum varð koyrdur út og snellurnar settar at leita uppeftir. Tvs at millum ein og tríggjar leitaðu frá 1200 m og upp, hinar frá 350 – 420 m og upp. Umframt snellurnar varð tá eisini tann eina makreldorgin nýtt, tann, sum var í sama borði sum snellurnar.
Tær snellurnar, sum høvdu 1200 av tráð á, høvdu sum oftast meira húkar undir, millum 14 og 26 húkar. Teir nýta 7 húkar vanligt, og tað var eisini nýtt til snellurnar, sum ikki fóru heilt djúpt.
Á flestu støðum, har fiskað varð, høvdu vit hemarahúk undir, og nakrir húkar vóru egndir við makreli.

**Veðrið:** Veðrið var sum heild hampuligt, tó var nakað av vindi viðhvørt. Í hálvanannan dag lógu vit stillir fyri veður. Tá varð hvørki fiskað ella leitað.

**Úrslit:** Úrslitið var sera vánaligt. Samanlagt var veiðan 500 kg. Talva 1 vísir veiðuna íalt.
Kort 1 vísir leiting og roynd. Kort 2 vísir leiting og hvar nakað var at fáa.

| Fiskaslag | Tal | Vekt samlað |
|---|---|---|
| Toskur | 21 | 120 |
| Makrelur | 568 | 370 |
| Brosma | 3 | 7 |
| Stóri Kongafiskur | 1 | 1,7 |
| Lítli Kongafiskur | 4 | 1 |
| **Veiða íalt** | **597** | **499,7** |

Talva 1: Samlað veiða

Makrelin fingu vit NE í føroyskum sjóøki. Toskin fingu vit vestanfyri. Tað mesta av makrelinum fingu vit eitt kvøldið í ca. 1 tíma. Ivaleyst kundu vit fingið meira av makreli afturat um vit vórðu liggjandi í sama stað, men vit valdu at sigla víðari um náttina.
Makrelin fingu vit á uml. 20 fv. dýpi. Tosk og annan fisk fingu vit niðri við botn burtursæð frá einum toski, sum kom á uppi í sjónum.

Siglt varð gjøgnum alt sildafeltið, har bátarnir plagdu at royna við sildagørnum, men har var einki at síggja, ei heldur var nakar fiskur at fáa. Sum heild kann sigast, at tað var sera lítið lív at síggja norðanfyri. Bert onkur hendinga havhestur, 2 springarar og ein hvalur. Eingin svartfuglur ella sild var at síggja.
Tað skrivaði sera lítið, men frægast var sunnan fyri 63°30N. Norðan fyri 63°30N var frægast eystan fyri 3°W. Tað, sum skrivaði, var støv millum 20 – 40 favnar og onkuntíð tunt støv/prikkar millum 100 – 140 favnar.
Vestanfyri var somuleiðis lítið at síggja, men tó meira enn norðanfyri. Støv var at síggja millum 20 – 40 favna dýpi og viðhvørt støv/prikkar millum 100 – 140 favna dýpi. Meira var til av havhesti og onkur hendinga svartfuglur.
Um skrivtina uppi í sjónum er annars at siga, at nakað av henni var hvalspýggja, tí bæði norðanfyri og vestanfyri sást av og á hvalspýggj í sjónum, tá fiskað varð.
Eina grind sóu vit á pos. 60°51N 12°34W og 3 døglingar á pos. 61°09N 9°44W.

**Niðurstøða:** Kort 1 og 2 vísa, hvar leitað hevur verið, og hvar fiskað hevur verið. Burtursæð frá makrelinum, einum toski og einum kongafiski, sum vit fingu á Íslandsrygginum, fingu vit einki uppi í sjónum. Leitað varð so víða, sum tíðin loyvdi. Vit sigldu gott 2000 fjórðingar tilsamans.
Nógv varð leitað, har skipini plagdu at verða á sild um hesa árstíðina í 50- og 60- unum, men har var einki at fáa og einki at síggja. Um sild hevði verið at sæð, kundi tað væl hent, at okkurt hevði verið at fingið, tí tá var okkurt at eta hjá fiskinum.
Um sild hevði verið at fingið í føroyskum øki um heystarnar aftur, hevði tað verið áhugavert at gjørt eina roynd aftur norðanfyri við snellu.
Tá hesar royndirnar vórðu gjørdar, var makreltíðin av í føroyskum øki. Sum tað sæst á korti 2, var bert makrelur at fáa úti við tað føroyska markið. Áhugavert hevði verið at gjørt royndir at dyrgt eftir makreli við einum størri snellubáti komandi ár á somu leiðum, sum russisk skip royna. Hendan royndin skal tó gerast í juli ella august mánað, sum er besta tíð til makrel í føroyskum sjóøki.




**Kort 1: Strikan vísir hvar siglt hevur verið. Rundingarnir vísa hvar fiskað hevur verið.**




**Kort 2: Strikan vísir hvar siglt hevur verið. Trýkankarnir vísa hvar nakar fiskur var at fáa.**